# Klaksvík fingið baði



MYNDAFRÁSØGN

Dorit Hansen
dorit@sosialurin.fo

Við einari 40 metra langari skreiðibreyt, tveimum heitum heilsuklivum og einum hugnaligum svimjihyli við fossum og tilgjørdum gróti kann Svimjihøllin í Klaksvík nú erpa sær av at hava Føroya fyrsta baðiland.

Leygardagin læt Svimjihøllin dyrnar upp til nýggja baðilandi. Fyrst var móttøka við røðum, tónleiki og sangi, og síðani fóru fossarnir í nýggja hylinum í gongd og skreiðibreytin læt upp. Fyrsti persónur á nýggju skreiðibreytini var borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn O. Jacobsen.

Til móttøkuna bjóðaði leiðarin fyri Mentanarnevndini í Klaksvíkar Býráð, Gunvá við Keldu, vælkomin og hugleiddi um svimjisøguna í Klaksvík. Karsten Ask frá Aqua Plan, sum hevur verið samskipari av arbeiðnum, og stjórin í Noroya Sparikassa, Eyfinn Reyðberg, søgdu eisini nøkur orð.

Nógvur tónleikur og sangur var. Millum annað sang Elin Løkin 'Tað lítla ljós eg fekk', áðrenn hon fór í svimjidrakt og royndi nýggju skreiðibreytina, sum hon helt vera ordiliga stuttliga.

Svimjihøllin er upprunaliga bygd í 1970unum, og av tí at byggingin ikki í nóg stóran mun tók hædd fyri at bygt var á mýrulendi, hava fleiri trupulleikar verið í gjøgnum tíðina.

Í sambandi við at baðilandið skuldi lata upp, varð tann gamli barnahylurin - lítli hylur - tómdur og reinsaður. Men tá menn skuldu fylla vatn í aftur, kom sprekka í botnin, og lítli hylur stendur tí tómur í løtuni.

Eftir ætlan skal lítli hylur setast í stand og útbyggjast um tvey ár, men spurningurin er nú, um hetta verður framskundað, ella um onkur fyribilsloysn verður funnin.

*Nýggi hylurin í Svimjihøllini í Klaksvík er bæði rúmligur og hugnaligur við fossandi vatni og tilgjørdum gróti. Útbyggingin er ætlað til at fáa fleiri fólk inn í svimjihøllina, og bæði leygardagin og sunnudagin vóru nógv vitjandi*

*Mynd: Dorit Hansen*



*Múrarin, Jan Elleby, hevur staðið fyri allari flísaleggingini, og Karl Josephsen hevur saman við Norðhús staðið fyri betongarbeiðinum*

*Mynd: Dorit Hansen*



*Pól Skarðenni, listamaðurin aftan fyri tilgjørda føroyska grótinum í hylinum, var saman við synunum millum fyrstu fólkini í hylunum. Pól Skarðenni hevur verið við til at gjørt fleiri stuttleikaparkir í Europa*

*Mynd: Dorit Hansen*



*Borgarstjórin, Steinbjørn O. Jacobsen, segði seg verið eitt sindur kroystan, tí hann hevði lovað leiðaranum fyri Svimjihøllina, Torkil Mørkøre, at hann skuldi vera fyrsti maður í skreiðibreytini*

*Mynd: Dávur Winther*